UTTAN ÚR HEIMI

## Slaka fyri Sharon

Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, hitti fyrradagin umboð fyri niðursetufólkini, sum eftir ætlanini hjá stjórnini skulu flytast úr Gaza-geiranum í summar.

Niðursetufólkini eru ímóti ætlanini hjá stjórnini, og tey hava hótt við at seta hart ímóti hørðum, men fundurin týsdagin verður tikin sum eitt tekin um, at tey kortini eru til reiðar at samstarva við myndugleikarnar, skrivar Reuter. Eitt av umboðunum hjá niðursetufólkunum viðgekk aftan á fundin við Sharon, at í veruleikanum hava tey einki at velja í, og at tey tí hava slakað fyri at varðveita ta ísraelsku eindina, sum hann tók til.

Øll niðursetufólkini verða kortini ikki flutt so langt burtur. Á fundinum týsdagin tosaðu partarnir um at byggja eina nýggja bygd nærhendis býnum Nitzan, sum er 20 kilometrar norðan fyri Gaza-geiran.

## Flogfeløg í vanda

Altjóða loftferðslufelagsskapurin IATA vil nú hava teir politisku myndugleikarnar kring heimin at skarva av avgjøldunum, sum flogfeløgini skulu gjalda.

Sambært IATA gera fleiri lond sær dælt av loftferðsluni við alt ov nógvum og dýrum avgjøldum, og tað kemur flogfeløgunum illa við, tí tey eru frammanundan tyngd av tí høga oljuprísinum. IATA sigur, at í ár kostar oljan flogfeløgunum 30 milliardir krónur í eykaútreiðsum, og tað hevur gjørt, at fleiri feløg hanga í einum kløðnum tráð. Eitt nú stríðast tey amerikonsku Unites Airlines og US Airways við at sleppa undan húsagangi.

Stjórin í IATA, Giovanni Bisignani, sigur við AP, at tað er órímiligt, at flogfeløgini hava stórt hall, samstundis sum flogvallirnir hava stórt avlop í rakstrinum. Hann sigur, at flogfeløgini flúgva við halli, meðan øll hini, sum hava samband við loftferðsluna, hava avlop.

Tað seinasta árið er ferðafólkatalið hjá flogfeløgunum vaksið umleið seks prosent, men tað er kortini ikki nóg mikið. Í síðsta mánað noyddist sveisiska felagið Swiss at leggja kongin, og tað er nú partur av tí týska Lufthansa.

## Undir illgruna fyri morð

Russisku herdeildirnar í Kekenia hava tikið ein mann, sum er undir illgruna fyri at hava verið uppií, tá seks útlendskar sjúkrasystrar vórðu myrdar í Kekenia í desember í 1996.

Tvær av sjúkrasystrunum vóru úr Noregi, og hinar fýra vóru úr Kanada, Spania, Niðurlondum og Ný Sælandi. Klokkan fýra um morgunin tann 17. desember í 1996 komu umleið 15 uppreistrarmenn inn á sjúkrahúsið, sum tær arbeiddu á. Sjúkrasystrarnar lógu og svóvu og vórðu skotnar í songini.

Tilburðurin skakaði altjóða hjálparfelagsskapirnar, sum høvdu sent fólk til Kekenia at veita hjálp, og altjóða Reyði Krossur tók alt fyri eitt síni hjálparfók úr Kekenia. Samstundis kravdi reyði Krossur, at teir russisku myndugleikarnir skuldu finna drápsmenninar. Nú siga russar, at teir hava tikið ein 30 ára gamlan mann, sum helst var ímillum teirra, sum søktu at sjúkrahúsinum.

## Steinaldarporno

Týskir fornfrøðingar hava funnið tvær 7200 ára gamlar leirmyndir, sum ímynda ein mann og eina kvinnu, sum hava samlegu, og sambært blaðnum Der Spiegel eru hetta teir elstu lutirnar av hesum slagnum, sum til eru.

Harald Stauble, ið er fornfrøðingur á fornfrøðisavninum í Sachsen, fann myndirnar, og hann sigur, at annaðhvørt hava maðurin og kvinnan samlegu, ella er talan um eitt ella annað slag av dansi, men sjálvur heldur hann tað fyrra vera tað mest sannlíka.

# Fúrstin í Monaco deyður

**Rainier fúrsti doyði í gjár eftir at hava stýrt Monaco í 56 ár**

MONACO
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í gjár doyði Rainier fúrsti í Monaco 81 ára gamal.

Rainier var av Grimaldiættini, sum hevur sitið við ræðið í Monaco í meiri enn 700 ár. Hann tók við valdinum í 1949. Í 1956 gjørdist hann kendur um allan heimin, tá hann giftist við amerikonsku filmskvinnuni Grace Kelly.

Tey seinastu tíggju árini hevur fúrstin havt vánaliga heilsu. Tann 7. mars varð hann fluttur á sjúkrahús, tí hann hevði trupulleikar við hjartanum og andadráttinum, og gjáramorgunin doyði hann.

Rainier og Grace Kelly áttu trý børn, og einasti sonurin, tann 47 ára gamli Albert prinsur, tekur við eftir faðirin.



*Rainier fúrsti sat við ræðið í Monaco í 56 ár*

# Vilja hava svartan páva

**Tey seinastu 20 árini er talið á katolikkum í Afrika tvífaldað, og nú vilja tey hava tann næsta pávan. Tey halda seg eisini hava tað besta valevnið**

PÁVAVAL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Meiri enn tveir triðingar av øllum katoplikkum í heiminum búgva nú á syðru jarðarhálvu. Harafturat økist talið á katolikkum skjótari í Afrika enn nakra aðrastaðni, og tí er tað ikki so løgið, at teir afrikonsku katolikkarnir halda seg hava rætt til tann næsta pávan.

At bara 13 av teimum 120 kardinalunum, sum skulu velja tann næsta pávan, eru úr Afrika, hevur sambært eygleiðarum í Rom ongan týdning, og teir viðganga samstundis, at teir afrikonsku katolikkarnir hava eitt veruliga væl egnað valevni at vísa á. Tað er tann 72 ára gamli nigeriski kardinalurin Francis Arinze, sum hevur verið ein av teimum ovastu leiðarunum í Vatikaninum. Hann ber orð fyri at vera líka konservativur sum Jóhannes Páll Annar og sigst eisini hava somu guðfrøðiligu sjónarmið sum hann.

Mong halda, at hann verður tann fyrsti svarti pávin, verður hann valdur, men so er ikki. Í árunum frá 189 til 217 , var tann svarti Viktur Fyrsti pávi. Frá 311 til 314 æt pávin Miltiades, og hann var eisini svartur, og frá 492 til 496 sat tann svarti Gelasius Fyrsti í pávastólinum í Rom.

# Danir væl fyri fíggjarliga

Sambært einari uppgerð hjá Danske Bank eiga danir 579.000 krónur í part. Tá eru fastar ognir, virðisbrøv, bilar, innbúgv og reiður peningur tald saman.

Seinastuni árini er virðið á sethúsum, íbúðum og summarhúsum hækkað nógv í Danmark, og tað hevur havt við sær, at í dag eru húsini hjá dønum 2.000 milliardir krónur verd. Harumframt eiga danir 2.200 milliardir krónur í pensjónsgrunnum. Bilarnir eru mettir til 186 milliardir krónur og innbúgvið til 92 milliardir krónur, sigur metingin hjá Danske Bank.